# Føroya Ráfiskakeyparafelag

# Ársfrágreiðing fyri 2009

Ein lýsing av fiskivinnuni og virkseminum hjá felagnum

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

# Samandráttur og frágreiðing frá nevndini

Flestu roknskapirnir fyri 2009 eru ikki alment tøkir enn, men vit vita kortini, at summi feløg kunnu vísa á betri úrslit í 2009 enn í 2008, meðan onnur helst hava heldur lakari úrslit. Vit vita eisini, at lítið virksemi hevur verið á summum virkjum í 2009, og at okkurt virki lá stilt stóran part av árinum. Samanumtikið man samlaða myndin tí helst líkjast henni frá 2008.

Um hugt verður eftir almennu roknskapartølunum fyri 2008, sæst at samlaða úrslitið hjá ráfiskakeyparum var sera vánaligt. Skulu vit lýsa gongdina hjá teimum feløgnum, ið primert eru ráfiskakeyparar er tó helst rættast at gera tillagingar fyri óvanligum niðurskrivingum og úrslitum frá dóttur- og assosieraðum feløgum. Um hetta verður gjørt, fæst eitt samlað úrslit, áðrenn skatt og óvanligar postar, sum gevur eitt hall á góðar 7 mió.kr. - Viðmerkjast skal tó, at flestu feløgini høvdu avlop áðrenn rentur, og at umleið helvtin av virkjunum tilsamans høvdu avlop á góðar 20 mió.kr., áðrenn skatt og óvanligar postar, meðan hin helvtin hevði góðar 27 mió.kr. í halli.

Í 2009 vóru lønargjaldingarnar í fiskavøruídnaðinum góðar 300 mió.kr., samanborið við 315 og 350 mió.kr í ávikavist 2008 og 2007. Umframt beinleiðis lønargjaldingar hevur avleidda virksemið frá fiskavøruídnaðinum eisini stóran samfelagsbúskaparligan týdning. Avleidda virksemið er t.d. innkeyp, fígging, flutningur, umvælingar, viðlíkahald, og aðrar vørur og tænastur, sum fyritøkur í fiskavøruídnaðinum eftirspyrja.

Samlaða útflutningsvirðið á fiskavørum í 2009 var umleið 3,63 mia.kr. Í mun til 2008 var hetta ein hækking á 90 mió.kr., ið svarar til umleið 2,5%. Í nøgd varð útflutningurin í 2009 gjørdur upp til 284.000 tons. Hetta er ein lækking á umleið 45.000 tons í mun til árið fyri. Lækkingarnar stava serliga frá minni útflutningi av fiskamjøli, svartkjafti og lodnu. Hinvegin eru nøgdirnar øktar av t.d. laksi, upsa og sild.

Feskfiskaveiðan í 2009 var á leið 112.000 tons, sum er nakað tað sama sum í 2008. Innanhýsis broytingar eru tó millum ymisku fiskasløgini. Eitt nú er nøgdin av hýsu – og í minni mun toski – lækkað, meðan nøgdin av upsa er nakað hækkað.

Í grundgevingunum fyri sínum tilmæli til fiskiskapin undir Føroyum, í fiskiárinum 2009/2010, sigur Havstovan, at stovnarnir av toski á Føroyabanka og á landgrunninum framvegis eru søguliga illa fyri, at hýsustovnurin er í skjótari minking, og at upsastovnurin eisini tykist í minking. Sagt verður beinleiðis, at støðan er hættislig, og víst verður til, at ICES mælir til onga veiðu eftir toski og hýsu í 2010, og at veiðan eftir upsa verður skerd við 20%. Samanumtikið mugu vit tí helst ásanna, at útlitini fyri fiskiskapinum eftir toski og hýsu ikki eru nakað serlig og at tað er mangt, ið bendir á, at veiðunøgdin av toski og hýsu verður nakað tann sama í 2010 sum í 2009. Um rætt

verður atborið, kann hinvegin hugsast, at glottar eru fyri framman. Sambært Havstovuni er nevniliga hugsandi, at toskastovnurin kemur fyri seg um nøkur fá ár. Hetta er tó treytað av, at veiðitrýstið komandi fiskiárini verður hildið niðri.

Verður hugt eftir fiskiskapinum undir Føroyum fyrstu tveir mánaðirnar í ár, í mun til fyrstu tveir mánaðirnar í 2009, sæst, at fiskiskapurin í ár er nakað lakari enn í fjør. Nøgdin er nevniliga minkað úr 18.800 tonsum til knapt 16.500 tons. Størsta lækkingin stavar frá, at veiðan av upsa er minkað við á leið 1.600 tonsum. Líkt er hinvegin til, at keðiliga gongdin í toska- og hýsufiskiskapinum kanska er við at steðga. Avreidda nøgdin av hýsu í hesum tíðarskeiði var nevniliga tann sama sum í fjør (1.100 tons), meðan nøgdin av toski var umleið 500 tons størri (2.400 tons).

Niðanfyri er ein stutt lýsing av nøkrum av tí, sum hevur verið á dagskrá hjá felagnum síðani seinasta aðalfund.

Fleiri limir í felagnum vóru ónøgdir við kassa- og flutningsskipanina hjá Kassamiðstøðini (KMS) og tosaðu um at taka seg úr skipanini. KMS hevur í hesum sambandi gjørt nakrar broytingar, ið m.a. merkja, at flutningsgjaldið til KMS er tikið burtur og at keyparar og seljarar nú sjálvir mugu finna loysnir á flutninginum. Hóast onkur limur í keypara-felagnum hevur verið ónøgdur við hesa broyting, so tykist tað sum flestu limirnir eru nøgdir við nýggju skipanina.

Í sambandi við gjaldføriskreppuna, ið rakti so at siga allan heimin sera meint í 2008, var ein trupulleiki, at føroyskir fiskaútflytarar mistu tryggingar uppá nakrar av sínum kundum. Avleiðingin av hesum var, at fíggjarstovnar ikki kundu fíggja sølukredittirnar og tí var vandi fyri, at virkini komu at liggja inni við stórum goymslum. Ein ætlaður bati á hesum trupulleika var at Eksport Kredit Fonden (EKF) fór undir at endurtryggja útflutningstryggingar. Í fyrstani var henda endurtrygging bert galdandi fyri sølu til lond, ið ikki vóru limir í ES ella OECD, men seinni er hetta víðka til at galda fyri tilsamans 150 lond, herundir øll ES-londini.

Fyriskipanin hjá ES-ráðnum viðvíkjandi ólógligum, ófráboðaðum, og óskipaðum fiskiskapi (IUU fishing), kom í gildi 1. januar 2010. Tað var Fiskimálaráðið, ið stóð fyri at fyrireika góðkenningina av føroysku veiðiváttanina, sum skal brúkast í hesum sambandi. Tað er tó Fiskiveiðieftirlitið, ið umsitur hetta øki, og hevur ábyrgdina av at góðkenna veiðiváttanir, í sambandi við at fiskur verður útfluttur til ES. Skipanin hevur nú verið í gildi í góðar 3 mánaðir, og sum skilst á flestu útflytarum, hava ikki staðist nógvir stórir trupulleikar av hesum.

Umhvørvismerking, burðardygg veiða – og ikki minst burðardygg umsiting av fiskastovnum - er framvegis á dagsskrá úti í heimi, og í vaksandi mun eisini heima hjá okkum. Fyrstu føroysku fiskiskapirnir hava nú fingið MSC-góðkenning og fyri okkara felag hevur tað stóran áhuga, hvussu fer at ganga við arbeiðinum hjá felagnum Trolskip, við at fáa eina tílíka góðkenning.

Trýsti frá keyparum í sambandi við burðardygga veiðu hevur verið sera sjónligt seinastu tíðina. Serliga hava vit sæð hetta í sambandi við at bretskar handilsketur ikki vilja keypa hýsu framleidda í Føroyum. Hesa støðu hava tær tikið, tí teirra ráðgevar siga, at føroyski hýsustovnurin ikki verður umsitin burðardygt. – Saman við øðrum hevur Ráfiska-keyparafelagið lagt stórt arbeiði í at upplýsa bretskar innkeyparar og onnur um okkara veiðu og umsiting, og hava í hesum sambandi bæði verið fundir í Føroyum og uttanlands. Fundir hava t.d. verið við Youngs og Coldwater, ið eru týðandi kundar hjá føroyskum framleiðarum. Fundur hevur eisini verið við felagsskapin Seafish, ið er sæddur sum ein leiðandi ráðgevandi stovnur fyri fiskivinnuna í Stóra Bretlandi. Hesir fundir hava víst, at tað sum so einki er galið við veiðiháttinum, men at tað meira er umsitingin av fiskastovnunum, sum er ein trupulleiki. Tí er eftir øllum at døma neyðugt, at nakrar politiskar avgerðir verða tiknar, áðrenn føroyskar fiskavørur aftur fáa betri atgongd til bretskar kølidiskar. Í tíðindaskrivi, sum Seafish sendi út aftaná at tey høvdu havt fund við umboð fyri føroyska fiskivinnu, varð hetta orðað soleiðis: *"There are issues that need to be addressed if the supply chain is to be re-established, particularly concerns over the discrepancy between government and scientific advice on numbers of fishing days."* Trupulleikin, ið her verður sipað til, er, at Løgtingið ásetur nógv fleiri fiskidagar enn ráðgevingin frá Havstovuni mælir til. Í summum førum er nøgdin av tillutaðum døgum eisini so stór, at hon langt frá verður brúkt, og tí er í veruleikanum talan um óavmarkað dagatal!

Seinasta ári ella so, hevur verið skipa fyri 2-3 fundum millum limir í Føroya Ráfiska-keyparafelag og umboð fyri Heilsufrøðiligu Starvsstovuna. Endamálið hevur verið at taka mál upp, ið eru av felags áhuga fyri virkini, og fáa hesi umrødd við tí í hyggju, at finna skilagóðar og brúkiligar loysnir fyri virkini. Millum fundirnar hevur eisini onkur arbeiðs-bólkur sitið og evnað uppskot til loysnir.

Uppskot til nýggja matvørulóg er lagt fram í Løgtinginum og liggur nú í Vinnunevndini. Felagið hevur áður latið Vinnumálaráðnum hoyringsskriv í hesum sambandi og hevur eisini havt høvi at møta í Vinnunevndini.

Saman við øðrum skipaði felagið 28. mai í fjør fyri ráðstevnuni The Faroe Islands Seafood Conference, sum Uttanríkisráðið var vertur fyri. Fleiri útlendskir fyrilestrar-

haldarar tóku lut á stevnuni, og evnini, sum vórðu viðgjørd, vóru m.a. marknaðarútlit, burðardygd og sporføri.

Føroya Sporførisskipan, sum ráfiskakeyparafelagið eigur helvtina av, hevur í fleiri ár arbeitt við at menna eina elektroniska farleið til sporføris- og hagtalsupplýsingar. Vit hava fingið at vita, at um hetta arbeiði skal koma víðari, er neyðugt at seta meira pening í felagi. Í hesum sambandi vildi felagið fyrst tryggja sær at undirtøka var fyri at brúka skipanini og hevur tí havt fleiri fundir við ymiskar aktørar. Tað stutta av tí langa er tó, at framtíðin hjá Føroya Sporførisskipan er ógvuliga óviss. Skal skipanin hava nakran møguleika er neyðugt við fleiri íløgum, og hóast hesar verða gjørdar, er framvegis eingin vissa fyri, at skipanin kemur at virka eftir ætlan. Neyðugt er eisini, at fyritøkur og almennir stovnar, ikki minst FVE og FISK, taka undir við hugskotinum um eina føroyska sporførisskipan og taka eina tílíka skipan til sín.

Í løtuni arbeiðir fiskimálaráðharrin við at broyta kunngerðina fyri avreiðing í Føroyum og uttanlands. Tað sum í hesum sambandi kanska er mest viðkomandi fyri okkara limir, er at ætlanin er at avtaka uppboðssølukravið til hýsu í eini royndartíð fram til 1. september 2010.

Víst verður annars til samlaðu ársfrágreiðingina, ið er tøk á aðalfundinum og annars verður løgd út á heimasíðuna hjá Vinnuhúsinum.

# Innihald

**INNGANGUR ........ 5**

FØROYA RÁFISKAKEYPARAFELAG ........ 5

ÚTFLUTNINGURIN ........ 6

RÁVØRUTILGONGDIN TIL VINNUNA ........ 8

MIÐAL AVREIÐINGARPRÍSIR ........ 9

ÚTFLUTNINGUR AV HEILUM KØLDUM FISKI ........ 10

AVREIÐINGAR UTTANLANDS ........ 11

FLAKAVINNAN ........ 11

VEIÐULIÐIÐ ........ 13

GONGDIN FYRSTU TVEIR MÁNAÐIRNAR AV 2010 ........ 14

ÚTLITINI FYRI FISKISKAPIN UNDIR FØROYUM ........ 14

**VIRKSEMI FELAGSINS Í FARNA ÁRI ........ 16**

ENDAMÁL OG FRAMTÍÐ FELAGSINS ........ 16

ARBEIÐSMARKNAÐARSPURNINGURIN ........ 17

ÚTFLUTNINGSTRYGGING- OG FÍGGING ........ 17

KASSAMIÐSTØÐIN ........ 17

ELEKTRÓNISK SPORFØRISSKIPAN ........ 18

ÓLÓGLIGUR, ÓFRÁBOÐAÐUR OG ÓSKIPAÐUR FISKISKAPUR (IUU FISHING) ........ 19

UMHVØRVISMERKING ........ 20

TRUPULLEIKAR AV, AT FISKASTOVNAR IKKI ERU NÓG BURÐARDYGT UMSITNIR ........ 20

THE FAROE ISLANDS SEAFOOD CONFERENCE ........ 21

SAMSTARVSFUNDIR VIÐ HEILSUFRØÐILIGU STARVSSTOVUNA ........ 22

NÝGGJ MATVØRULÓG ........ 22

BROYTINGAR Í KUNNGERÐ UM AVREIÐINGAR Í FØROYUM OG UTTANLANDS ........ 22

# Inngangur

Henda ársfrágreiðing varð løgd fram á aðalfundinum hjá Føroya Ráfiskakeyparafelag tann 23. apríl 2010. Ráfiskakeyparafelagið er eitt áhugafelag hjá ráfiskakeyparum í Føroyum. Uppgávan hjá felagnum er at menna vinnuna í samstarvi við einstøku limirnar, myndugleikar og stovnar, ið varða av fiskivinnuni. Felagið heldur til í Vinnuhúsinum og hevur felags umsiting við Føroya Arbeiðsgevarafelag og øðrum vinnufeløgum.

Endamálið við frágreiðingini er at geva limum okkara og øðrum áhugaðum eina stutta lýsing av gongdini í fiski- og flakavinnuni og virksemi felagsins.

## Føroya Ráfiskakeyparafelag

Í nevndini fyri Føroya Ráfiskakeyparafelag eru:

Simon P. Jacobsen, formaður
Regin Mikkelsen, næstformaður
Petur Mohr
Joen Magnus Rasmussen
Páll Gregersen

Limirnir í Føroya Ráfiskakeyparafelag eru:

| | |
|---|---|
| FarIta P/F | Sandoy Seafood P/F |
| Delta Seafood | Eystís P/F |
| J.M.A. v/Jógvan Absalonsen | Thomson P/F |
| Faroe Seafood P/F | Norðís P/F |
| Tavan Sp/f | Suðuroyar Fiskakeyp |
| Vaðhorn Seafood P/F | Rainbow Seafood Sp/f |
| Fiskavirkið P/F | FoFish Sp/f |
| Kósin P/F | Norðfra Sp/f |
| Hvilvtenni P/F | |
| Nevið Fiskaeksport Sp/f | |

# Um fiski- og flakavinnuna

## Útflutningurin

Samlaði føroyski útflutningurin av fiskavørum í nøgd og virði er vístur í mynd 1. Í nøgd er útflutningurin í 2009 gjørdur upp til 284.000 tons. Hetta er ein minking á umleið 45.000 tons í mun til 2008, og meir enn 100.000 tons í mun til 2007. Hetta merkir samstundis, at nøgdin av føroyskum fiskaútflutningi hevur ikki verið so lág síðani seinnu helvt av 90'unum. Sambært hagtølunum stavar lækkingin serliga frá minni útflutningi av fiskamjøli, lodnu, og svartkjafti. Útflutningur av hesum 3 bólkum er minkaður við tilsamans 63.000 tonsum, herav bara útflutningurin av svartkjafti er minkaður við 40.000 tonsum. Hinvegin er nøgdin av laksi økt við 10.000 tonsum, av upsa við knapt 5.000, og av sild við knapt 4.000 tonsum. Umleið 4.700 tons av lýsingi vóru eisini útflutt í 2009. Hetta er annars eitt fiskaslag, sum nærum ikki hevur verið at sæð í hagtølunum fyrr.




*Mynd 1. Útflutningur av fiskavørum: Nøgd og virði frá 2000 til 2009 (Kelda: Hagstova Føroya)*

Hóast stóru lækkingina í samlaðu útflutningsnøgdini, er samlaða virðið av fiskaútflutninginum í 2009 økt við umleið 90 mió.kr., ið svarar til eina hækking á umleið 2,5 prosent í mun til í 2008. Samlaða útflutningsvirðið á fiskavørum í 2009 var 3,63 mia.kr., men í mun til 2008 eru fleiri forskjótingar millum ymisku fiskasløgini. Dømi um broytingar er m.a. at útflutningsvirðið á toski er minkað við 200 mió.kr; hetta hóast nøgdin so at siga er óbroytt frá 2008 til 2009. Aðrar stórar virðislækkingarnar vóru t.d. at síggja í útflutningum av hýsu og fiskamjøli, ið minkaði við ávikavist 72 og 58 mió.kr. Hinvegin er útflutningsvirðið á laksi økt við 386 mió.kr. og á sílum við 37 mió.kr. Sostatt er tað í stóran mun útflutningur av aldum fiski, ið heldur samlaða útflutningsvirðinum

uppi, men onnur fiskasløg hava tó eisini hjálpt til. Eitt nú er útflutningsvirðið á upsa og sild hækkað við ávikavist 80 og 30 mió.kr.

Í skjali 1, sum sæst aftast í hesari frágreiðing, er eitt útgreina yvirlit yvir útflutningsnøgd og –virði fyri flestu fiskasløg.

Samlaða útflutningsnøgdin av frystum og køldum flaki, úr toski, hýsu og upsa, var umleið 1.000 tons størri í 2009 enn í 2008. Hinvegin var útflutningsvirðið av hesum vørum góðar 75 mió.kr. lægri í 2009. Størsta orsøkin til lækkaða virðið er, at prísurin á toskafløkum í miðal var góðar 15 kr lægri per kilo í 2009 enn í 2008. Hetta er ein lækking, ið svarar til næstan 37%, og sum við óbroyttari nøgd av toskafløkum merkti, at útflutningsvirðið minkaði við 90 mió.kr. Í hesum sambandi skal eisini havast í huga, at prísurin á toskafløkum longu lækkaði við 13% í 2008, og at miðalprísurin í 2009 tí ikki var meir enn gott helvtina av miðalprísinum í 2007.

| | **Nøgd í tonsum** | | **Virði í 1.000 kr.** | | **Miðalprísur/kg.** | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2008** | **2009** | **2008** | **2009** | **2008** | **2009** |
| **Flak, fryst og kølt** | | | | | | |
| Toskur | 5.803 | 5.990 | 243.945 | 158.520 | 42,04 | 26,47 |
| Hýsa | 2.512 | 1.821 | 77.136 | 38.572 | 30,71 | 21,18 |
| Upsi | 20.835 | 22.366 | 424.930 | 473.663 | 20,39 | 21,18 |
| Onnur fiskasløg | 1.938 | 1.334 | 43.835 | 33.280 | 22,62 | 24,95 |
| **Tilsamans** | **31.087** | **31.511** | **789.846** | **704.034** | **25,41** | **22,34** |
| | | | | | | |
| **Saltfiskur, flaktur og flak** | | | | | | |
| Toskur | 5.328 | 4.347 | 309.584 | 191.987 | 58,10 | 44,16 |
| Hýsa | | | | | | |
| Upsi | 1.960 | 2.892 | 26.141 | 38.374 | 13,34 | 13,27 |
| Onnur fiskasløg | 3.757 | 3.984 | 112.710 | 100.191 | 30,00 | 25,15 |
| **Tilsamans** | **11.045** | **11.223** | **448.435** | **330.553** | **40,60** | **29,45** |
| | | | | | | |
| **Heilur fiskur, frystur og køldur** | | | | | | |
| Toskur | 1.736 | 2.184 | 34.108 | 35.320 | 19,65 | 16,17 |
| Hýsa | 4.285 | 3.737 | 69.360 | 51.151 | 16,19 | 13,69 |
| Upsi | 1.574 | 3.153 | 10.348 | 26.988 | 6,57 | 8,56 |
| Onnur fiskasløg | 15.818 | 17.184 | 267.607 | 229.096 | 16,92 | 13,33 |
| **Tilsamans** | **23.413** | **26.258** | **381.423** | **342.555** | **16,29** | **13,05** |

*Mynd 2. Útflutningur í nøgd og virði, býtt á vørubólkar av toski, hýsu og upsa (Kelda: Hagstova Føroya)*

Tað telur eisini skeiva vegin, at nøgdin av hýsufløkum er minkað við umleið 700 tonsum frá 2008 til 2009, samstundis sum miðalprísurin á hesum fløkum er lækkaður við umleið einum triðingi. Positiva vegin telur, at nøgdin av upsafløkum er hækkað við 1.500 tonsum, samstundis sum miðalprísurin í 2009 hækkaði við umleið 80 oyrum í mun til í

2008. Ávirkanin av hesum báðum broytingum var ein hækking í útflutningsvirðinum á 48 mió.kr.Nøgdirnar av útfluttum saltfiski vóru á leið tær somu í 2009 sum í 2008. Tonsatalið hevur bæði árini ligið um gott 11.000 tons. Ein broyting millum fiskasløgini er tó hend, við tað at nøgdin av saltaðum toski er minkað við umleið 1.000 tonsum, meðan nøgdin av saltaðum upsa er hækkað við umleið 900 tonsum. Nøgdin av øðrum saltfiski, t.e. serliga longu og brosmu er hækkað við 200 tonsum.

Hóast samlaða nøgdin av saltfiski ikki broyttist nógv frá 2008 til 2009, er útflutningsvirðið minkað við næstan 120 mió.kr. Umframt minni nøgd av toski, er størsta orsøkin til hetta, at miðalprísurin á saltaðum toski var næstan ein fjórðing lægri í 2009. – Um enn í minni mun, telur tað eisini skeiva vegin, at miðalprísurin á øðrum saltfiski (t.e. brosmu og longu) var umleið 15 prosent lægri í 2009 enn í 2008.

Útfluttu nøgdirnar av frystum og feskum óvirkaðum fiski, eru øktust við á leið 3.000 tonsum í 2009. Tó er virðið á hesum útflutningi minkað við knøppum 40 mió.kr. í mun til í 2008. Leggjast kann til merkis, at meðan miðalprísurin per kg upsa er hækkað, er prísurin á hinum fiskasløgunum lækkaður.

## Rávørutilgongdin til vinnuna

Um hugt verður eftir fiskiskapinum seinastu tvey árini, kann staðfestast, at feskfiskaveiðan í 2009 var so at siga tann sama sum í 2008, t.e. á leið 112.000 tons. Innanhýsis broytingar eru tó millum fiskasløgini, við tað nøgdin av hýsu – og í minni mun toski – er lækkað, meðan nøgdin av upsa er nakað hækkað.

Avreiðingarvirðið á feskum fiski var knappar 777 mió.kr. í 2009 móti góðum 900 mió.kr. í 2008, ið lutfallsliga svarar til eina virðislækking á umleið 14%. Hyggja vit longur aftur, kunnu vit síggja, at avreiðingarvirðið í 2007 var 1,16 mia.kr. og í 2006 1,25 mia.kr. Hetta merkir, at avreiðingarvirðið á feskum fiski var næstan eina hálva milliard lægri í 2009 enn í 2006.

| | Nøgd í tonsum | | Virði í 1.000 kr. | | Miðalprísur pr. kg | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fiskaslag** | **2008** | **2009** | **2008** | **2009** | **2008** | **2009** |
| **Toskur** | 11.734 | 10.830 | 237.948 | 138.629 | 20,28 | 12,80 |
| **Hýsa** | 7.453 | 5.217 | 84.154 | 47.876 | 11,29 | 9,18 |
| **Upsi** | 51.013 | 53.505 | 259.045 | 298.135 | 5,08 | 5,57 |
| **Annar botnfiskur** | 11.853 | 11.812 | 109.605 | 85.838 | 9,25 | 7,27 |
| **Flatfiskur tils.** | 5.379 | 5.036 | 112.867 | 107.895 | 20,98 | 21,42 |
| **Onnur fiskasløg tils.** | 24.427 | 25.738 | 99.258 | 98.183 | 4,06 | 3,81 |
| **Veiðan tilsamans** | 111.859 | 112.139 | 902.876 | 776.556 | | |

*Mynd 3. Feskfiskaveiða: Nøgd, virði og miðalprísur í 2008 og 2009 (Kelda: Hagstova Føroya)*

Talvan í mynd 3 vísir, at á leið tað sama er avreitt av flestu fiskasløgum í 2009 sum í 2008. Sum tað longu er víst á, er tó minni avreitt av hýsu og toski, meðan tað er avreitt nakað meira av upsa.

Talvan vísir eisini, at avreiðingarprísurin pr. kg. er lægri í 2009 enn í 2008 á so at siga øllum feskfiskasløgunum. Serliga sjónligt er tað við toskaprísinum, sum er lækkaður við meira enn einum triðingi. Einasti miðalprísur, ið kvinkar nakað serligt upp eftir, er prísurin á upsa, sum er hækkaður næstan 10% í mun til miðalprísin í 2008.

2009 var annars sjeynda ári á rað, at minking var í toskafiskiskapinum. Í 2002 vóru avreidd góð 38.000 tons, meðan tað í 2009 bert vóru avreidd sløk 11.000 tons, ella bert umleið ein fjórðingur av nøgdini fyri sjey árum síðani.

Fiskiskapurin eftir hýsu er nú minkaður í seks ár á rað. Veiðunøgdin í 2003 var umleið 24.600 tons, meðan hon í 2009 bert var góð 5.000 tons, ella umleið 20% av nøgdini fyri seks árum síðani

Upsafiskiskapurin sær hinvegin út til at halda sær nøkulunda. Eftir at verða fallin í 3 ár á rað, hækkar avreiðingarnøgdin av hesum fiskaslagi nevniliga aftur í 2009, tá tá vórðu avreidd góð 53.000 tons. Hetta er nakað meir enn miðalveiðan seinastu 10 árini, ið hevur verið sløk 50.000 tons.

## Miðal avreiðingarprísir

Mynd 4 vísir gongdina í miðal avreiðingarprísunum á toski, hýsu og upsa frá 2001 til 2009. Myndin vísir nú greitt, at gongdin við hækkandi prísum á toski og hýsu fekk ein bráðan enda í 2007. Miðal avreiðingarprísurin fyri tosk var í 2009 tann lægsti í hesari øldini, meðan tað fyri hýsu bert hava verið lægri prísir í 2003 og 2004. Hinvegin vísir myndin eisini, at prísurin á upsa liggur rímiliga javnt um 5 kr/kg, og at hesin í 2009 var hægri enn hann fyrr hevur verið í hesari øldini.




*Mynd 4. Miðalprísir á toski, hýsu og upsa frá 2001-2009 (Kelda: Hagstova Føroya)*

Til og við 2007 vigaðu príshækkingarnar væl upp ímóti minkandi nøgdunum av serliga toski og hýsu. Men hesi bæði síðstu árini hava avbjóðingarnar hjá vinnuni verið serliga stórar, tí miðalprísirnir eru nógv lækkaðir, samstundis sum nøgdirnar halda áfram at minka.

## Útflutningur av heilum køldum fiski

Síðani ógvusligu hækkingina í tíðarskeiðnum frá 2000 til 2003, hevur útflutningurin av heilum køldum fiski verið javnt minkandi seinnu árini. Eitt undantak var tó útflutningurin av upsa, sum hækkaði nakað í 2005.




| | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur | 3.470 | 4.486 | 10.18 | 8.396 | 6.182 | 4.371 | 3.676 | 1.884 | 1.714 | 2.152 |
| Hýsa | 4.244 | 6.445 | 13.18 | 14.42 | 12.10 | 10.57 | 9.506 | 7.052 | 4.280 | 3.729 |
| Upsi | 1.814 | 5.210 | 11.26 | 13.20 | 9.374 | 11.87 | 4.214 | 3.932 | 1.574 | 3.153 |

*Mynd 5. Útflutningur av heilum køldum fiski (Kelda:Hagstova Føroya)*

Samlaða nøgdin av toski, hýsu og upsa, sum fór óvirkað av landinum í 2009, var 9.034 tons. Hetta vóru sløk 1.500 tons fleiri enn í 2008, tá nøgdin var 7.568 tons. Til samanberingar var samlaða veiðunøgdin av hesum trimum fiskasløgum umleið 70.000 tons bæði í 2008 og í 2009. So nøgdin av hesum trimum fiskasløgum, sum verður útflutt óvirkað, er hóast alt eini 12-13 prosent av samlaðu veiðuni. Tá sløk 4.000 tons av hýsu verða útflutt sum heilur fiskur og samlaða veiðan bert er góð 5.000 tons, kann ein tó skjótt rokna út, at serliga fyri hýsu er hetta lutfalli nógv størri.

## Avreiðingar uttanlands

Mynd 6 vísir gongdina í avreiðingum uttanlands. Tað sæst, at eftir at hava verið rímuliga støðugar frá 2006 til 2008 hækkaðu nøgdirnar nakað í 2009. Samlaða nøgdin avreidd uttanlands í 2009 var 11.000 tons, harav annar fiskur, enn toskur, hýsa og upsi, taldi 8.000 tons. Í mun til árini frá 2002 til 2005, tá rættuliga nógvur fiskur varð landaður uttanlands, kemur tað nú nærum ikki fyri, at toskur og hýsa verða avreidd uttanlands. Nakað av upsa verður framvegis avreiddur uttanlands, og var henda nøgd umleið 2.500 tons í 2009.




*Mynd 6. Landingar uttanlands 2000-2009 (Kelda: Fiskiveiðieftirlitið)*

Økingin frá 2008 til 2009 stavar serliga frá at nøgdin av “Annað” økist við umleið 2.000 tonsum. Útgreiningar av hesum bólki eru ikki fingnar til vega, men hagtølini vísa, at tað serliga eru lemma- og partrolarirnir, ið hava avreitt meira av hesum.

## Flakavinnan

Um hugt verður eftir almennu roknskapartølunum fyri 2008, sæst at samlaða úrslitið hjá ráfiskakeyparum eisini hetta ári var sera vánaligt. Ein leyslig samanteljing av ársúrslitunum gevur nevniliga eitt hall á góðar 70 mió.kr. Skulu vit lýsa gongdina hjá teimum feløgnum, ið primert eru ráfiskakeyparar er tó helst rættast at tillaga fyri úrslitinum frá dóttur- og assosieraðum feløgum. Um hetta verður gjørt, fæst eitt samlað úrslit, áðrenn skatt og óvanligar postar, sum gevur eitt hall á góðar 7 mió.kr. Hetta er á leið 1,5 mió.kr. verri enn í 2007.

Hóast samlaða myndin ikki sá væl út, var tó ójavnt hvussu 2008 royndist hjá ymisku feløgunum. Á mynd 7 sæst, at 10 feløg høvdu avlop áðrenn skatt og óvanligar postar, meðan 9 feløg høvdu hall. Feløgini við positivum úrsliti høvdu tilsamans góðar 20 mió.kr. í avlopi, meðan feløgini við negativum úrsliti høvdu tilsamans góðar 27 mió.kr í halli. Í 2007 vóru hesi tøl ávikavist 12 og 17 mió.kr., og tí kunnu vit siga, at áðrenn skatt og óvanligar postar, hava virkini við avlopi samanlagt hava klára seg betri í 2008 enn í 2007, meðan virkini við halli samanlagt hava klára seg verri.

Tað kann eisini viðmerkjast, at áðrenn avskrivingar høvdu 15 av hesum 19 feløgunum tilsamans 63 mió.kr. í avlopi, meðan 4 teirra høvdu eitt samlað undirskot á umleið 5,8 mió.kr. Áðrenn rentur høvdu 11 feløg eitt samlað avlop á 41 mió.kr., meðan hini 8 høvdu eitt undirskot á knappar 12 mió.kr.

Í samfelagsbúskaparligum høpi eigur tað eisini at hava áhuga, at hesi virkini hava rindað slakar 300 mió.kr. í beinleiðis lønum, umframt tað tey hava lagt eftir seg í avleiddum virksemi í sambandi við innkeyp, fígging, umvælingar og annað.




*Mynd 7. Tillagað úrslit, áðrenn skatt og óvanligar postar, hjá 19 feløgum (Kelda: Vinnuvitan.biz og egnar tillagingar)*

Flestu roknskapirnir fyri 2009 eru ikki alment tøkir enn, men tað ljóðar frá virkjunum, at samlaða myndin helst líkist henni frá 2008. Nøkur virki hava tó havt betri úrslit, meðan onnur hava havt verri úrslit enn í 2008. Á summum virkjum hevur ikki verið nógv virksemi og okkurt lá stilt ein stóran part av 2009, men hevur nú fingið nýggjar eigarar og er latið upp aftur.

Eins og 2008 var 2009 annars í nógvar mátar eitt baldrut ár, eisini hjá ráfiskakeyparum. Fíggjarkreppa og búskaparkreppa hava á ymiskan hátt havt ávirkan á okkara arbeiðsumstøður. Millum annað hevur búskaparliga skrallið í Íslandi og tann nógv viknaða íslendska krónan givið okkara íslendsku kappingarneytum ein fyrimun. Virðið á norsku krónuni er nú hækkað aftur, men bretska pundið er framvegis lágt í mun til evruna og donsku krónuna, og hetta hevur neiliga ávirkan á kappingarførið hjá føroyskum virkjum. Samstundis mugu vit ásanna, at keypiorkan hjá okkara kundum er hart rakt av gjaldføriskreppuni, ið hevur rakt so at siga allan heimin. Hetta er ikki minst galdandi fyri okkara týðandi marknaðir í Spania og Italia.

Flakavinnan hevur annars seinastu nógvu árini havt trupulleikar við at rekruttera starvsfólk til vinnuna. Flakavinnan hevur ikki klárað kappingina um starvsfólkini við tænastuvinnuna og almenna sektorin. Fyri virkini merkti hetta, at framleiðsluorkan minkaði og framleidni í vinnuni versnaði. Henda støða er tó nakað broytt nú og skyldast hetta serliga, at útboðið av arbeiði í øðrum vinnum er vorðið minni. Í hesum sambandi er tó eisini viðkomandi, at arbeiðarafeløgini og Føroya Arbeiðsgevarafelag í løtuni samráðast um nýggjan lønarsáttmála. Vónandi verður úrslitið av hesum samráðingum, at vit í minsta lagi ikki fáa verri kappingarføri enn í dag.

Samanumtikið kann sigast, at 2010 sær út til at gerast enn eitt avbjóðandi ár fyri føroyskar ráfiskakeyparar. Vónir eru um, at støðan á heimsmarknaðunum so líðandi er við at gerast betri, og glið tí aftur fer at koma á søluna. Og vónandi merkir hetta eisini, at prísirnir samstundis fara at kvinka upp eftir. – Í aðrar mátar hava vit trupulleikar at sleppa av við summar vørur, tí keyparar seta krøv, um burðardygga umsiting, sum vit ikki megna at halda.

## Veiðuliðið

Sum tað eisini er greitt frá frammanfyri, var samlaða feskfiskaveiðan í 2009 um 112.000 tons, sum var nakað tað sama sum í 2008. Innanhýsis broytingarnar millum skipabólkarnar vóru heldur ikki stórar frá 2008 til 2009. Reiðskapsbólkarnir lemmatrol, lína, gørn og annað hava veitt nakað minni enn í 2008, meðan partrol og snella hava veit nakað meir. Lutfallsliga størsta broytingin er hjá snelluskipunumum, sum meir enn tvífaldaðu veiðunøgdina í 2009 í mun til 2008. Í nøgd var 2009 soleiðis besta árið hjá snelluskipunum síðani 2003. Línuflotin fiskaði knøpp 20.000 tons í 2009, sum er umleið 2.000 tons minni enn í 2008, og minni enn helvtin av veiðunøgdini í 2003 og 2004. Hesin skipabólkur er framvegis hart raktur av, at lítið er at fáa av toski og hýsu.

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Lemmatrol** | 30.627 | 30.609 | 30.878 | 33.264 | 32.503 | 21.890 | 20.782 |
| **Partrol** | 48.607 | 44.962 | 62.811 | 61.912 | 57.238 | 63.344 | 65.179 |
| **Lína** | 46.880 | 40.230 | 34.972 | 32.573 | 26.257 | 21.787 | 19.658 |
| **Snella** | 4.146 | 2.963 | 2.824 | 3.232 | 2.028 | 1.853 | 3.776 |
| **Gørn og annað** | 3.445 | 3.305 | 3.264 | 3.182 | 3.019 | 2.986 | 2.596 |
| **Reiðskapur tilsamans** | 133.704 | 122.069 | 134.748 | 134.162 | 121.045 | 111.859 | 111.991 |

*Mynd 8. Fiskiskapurin hjá heimaflotanum frá 2003-2009 í tonsum (Kelda: Hagstova Føroya)*

Úrslitini hjá flotanum fyri 2009 eru ikki tøk enn, men lítið bendir á, at hesi vera góð. Nøkur skip, kanska serliga partrolarar, fáa helst líkinda úrslit, men fleiri skip høvdu helst vánlig úrslit í 2009.

## Gongdin fyrstu tveir mánaðirnar av 2010

Verður hugt eftir fiskiskapinum undir Føroyum, fyrstu tveir mánaðirnar í ár, í mun til fyrstu tveir mánaðirnar í 2009, sæst, at fiskiskapurin í ár er nakað lakari enn í fjør. Nøgdin er nevniliga minkað úr 18.800 tonsum til knapt 16.500 tons. Hetta lækking stavar serliga frá at nøgdin av upsa er minkað við á leið 1.600 tonsum, meðan gott 700 tons færri eru veidd av skjeljadjórum. Líkt er hinvegin til, at keðiliga gongdin í toska- og hýsufiskiskapinum kanska er við at steðga. Avreidda nøgdin av hýsu í hesum tíðarskeiði var nevniliga tann sama sum í fjør (1.100 tons), meðan nøgdin av toski var umleið 500 tons størri (2.400 tons).

## Útlitini fyri fiskiskapin undir Føroyum

Í grundgevingunum fyri sínum tilmæli til fiskiskapin undir Føroyum, í fiskiárinum 2009/2010, segði Havstovan, at stovnarnir av toski á Føroyabanka og á landgrunninum framvegis eru søguliga illa fyri, at hýsustovnurin er í skjótari minking og at upsastovnurin eisini tykist í minking. Sagt verður beinleiðis, at støðan er hættislig, og víst verður til, at ICES mælir til onga veiðu eftir toski og hýsu í 2010, og at veiðan eftir upsa verður skerd við 20%. Í sínum grundgevingunum sigur Havstovan eisini, at best hevði verið at banna allari veiðu eftir toski og hýsu, men at tað vildi elvt til, at næstan allur flotin varð lagdur. Havstovan mælti tí í staðin til, at fiskidagatali hjá línuskipunum og øðrum skipabólkum, ið serliga veiða tosk og hýsu (bólkur 3, 4 og 5), varð minkað við 50%, meðan fiskidagatalið hjá partrolarunum varð minkað við 20%, og at samsvarandi minking eigur at vera gjørd í royndini hjá lemmatrolarum. Sambært Havstovuni vísa framskrivingar, at hesir niðurskurðir, saman við øðrum reguleringum, vildu fingið

toskastovnin at vaksa spakuliga aftur. – Hóast greiða tilmælið frá Havstovuni, mælti fiskimálaráðharrin tó bert til at skerja dagatalið við 5% í mun til fiskiárið 2008/2009.

Samanumtikið mugu vit helst ásanna, at útlitini fyri fiskiskapinum eftir toski og hýsu ikki eru nakað serlig og at tað er mangt, ið bendir á, at veiðunøgdin av toski og hýsu verður nakað tann sama í 2010 sum í 2009. Hinvegin kann tað kanska liggja ein vón í, at útlitini hava verið líka ring onkuntíð fyrr og at tað tá kortini hevur bragdað aftur. T.d. sigur Havstovan í viðmerkingunum til sítt seinasta tilmæli m.a., at tað er hugsandi, at toskastovnurin kemur fyri seg um nøkur fá ár, men at økingin er treytað av, at veiðitrýstið komandi fiskiárini verður hildið niðri. Havstovan sigur tó samstundis, at teirra útrokningar vísa, at verandi veiðitrýst er so høgt, at toskastovnurin sum frá líður kemur at geva minni og minni av sær. Viðvíkjandi hýsuni vísa seinastu yvirlitstrolingarnar hjá Magnusi Heinasyni, at minkingin seinasta ári ikki var stór, og tí metir Havstovan, at glottar eru fyri stavn, eisini fyri hýsu.

Hóast upsastovnurin er í minking, tykist hann enn lutfallsliga væl fyri og tí kunnu vit helst vænta á leið somu veiðu sum seinnu árini. Onnur fiskasløg sum t.d. brosma og longa tykjast at vera rættuliga støðug og sambært seinastu kanningunum hjá Magnus Heinasyni tykjast hesir stovnar framvegis at vera væl fyri. Hóast veiðan eftir gullaksi er nógv økt seinnu árini tykist hesin stovnurin sambært Havstovan framvegis eisini at vera væl fyri.

# Virksemi felagsins í farna ári

Niðanfyri er ein stutt lýsing av nøkurm málum, sum hetta seinasta árið hava verið viðkomandi fyri virksemið hjá Føroya Ráfiskakeyparafelag.

Seinast Føroya Ráfiskakeyparafelag hevði aðalfund var 14. apríl 2009. Nevndarlimirnir, ið stóðu fyri vali tá, vóru Joen Magnus Rasmussen og Jógvan Gregersen. Joen Magnus varð afturvaldur, men Jógvan stillaði ikki upp aftur. Í hansara stað valdi aðalfundurin í staðin Regin Mikkelsen. Hinir nevndarlimirnir eru Simon P. Jacobsen, Páll Gregersen og Petur H. Mohr. Seinni skipaði nevndin seg við Simon P. Jacobsen sum formanni og Regin Mikkelsen sum næstformanni.

## Endamál og framtíð felagsins

Í viðtøkunum fyri felagið stendur, at endamál felagsins er at savna allar føroyskar ráfiskakeyparar til at útinna felags áhugamál og at verja áhugamál limanna.

Nevndin í felagnum hevur fyrr sjálv sett spurnartekin við, hvussu umdømi hjá felagnum er, og um felagið arbeiðir nóg málrætta. Tosað hevur verið eitt sindur um grundarlagið fyri felagnum, tvs. hví er felagið til? Felagið hevur helst havt eitt breiðari grundarlag fyrr, men tað er framvegis neyðugt við einum organi, sum kann tala og arbeiða fyri okkara áhugamálum, kanska serliga tá aktuell mál eru frammi. Hinvegin er kanska meira ógreitt, hvørjum yvirskipaðum málum vit royna at røkka. Semja hevur tó verið um, at týdningarmikið er at arbeiða fyri menning av útflutningsviðurskiftunum og at arbeiða proaktivt við kunning um Føroyar, fiskiskap og framleiðslu.

Hugskot hava verið frammi um, antin at umskipa Ráfiskakeyparafelagið ella at stovna nýtt vinnufelag fyri føroysku útflutningsvinnuna. Skotið hevur eisini verið upp, at leggja keypara- og seljarafeløgini saman í eitt nýtt felag, ella finna eina skipan fyri, hvussu hesi bæði, og kanska onnur feløg við, kunnu arbeiða meira saman. Hugsanin aftanfyri hesi hugskot er, at seta fokus á útflutning í staðin fyri keyp og sølu millum skip og virkir. Arbeiðast kann tá meira miðvíst við størri uppgávum, sum t.d. at viðgera spurningin um umhvørvismerking, útflutningsframa, branding av føroyskum vørum o.s.fr.

Enn er onki ítøkiligt spurt burturúr hesum tankum, men hinvegin vita vit, at føroyskir alarar í løtuni arbeiða við at menna eitt felags “brand” fyri føroyskan laks. Um hetta eydnast væl, er ikki óhugsandi, at hetta kann víðkast ella kopierast til branding og marknaðarføring av føroyskum fiski sum heild.

## Arbeiðsmarknaðarspurningurin

Í nógv ár hevur tað verið eitt afturvendandi evni, at flestu fiskavirkir mangla arbeiðsmegi. Arbeiðsloysið í Føroyum var í fleiri ár sera lágt og lógarforðingar gjørdu, at sera torført var at fáa útlendska arbeiðsmegi at arbeiða á virkjunum. Hetta hevði serliga neiliga ávirkan á fiskavirkini, tí hesin parturin av arbeiðsstyrkini er sera flytførur.

Tað eydnaðist langt um leingi at minka um lógarforðingarnar og fáa eina skipan, sum gjørdi tað lættari at fáa útlendska arbeiðsmegi til virkini. Henda skipan var tó bert í gildi so leingi arbeiðsloysið var minni enn 4,5%, og er tí ikki virkin í løtuni, nú arbeiðsloysið er hægri enn tað. Hinvegin hevur hækkaða arbeiðsloysið havt við sær, at betri møguleikar nú eru at fáa fólk at arbeiða á fiskavirkjunum, og tí er manglandi arbeiðsmegi í løtuni ikki ein trupulleiki.

## Útflutningstrygging- og fígging

Í sambandi við gjaldføriskreppuna, ið rakti so at siga allan heimin sera meint í 2008, var ein trupulleiki, at føroyskir fiskaútflytarar mistu tryggingar uppá nakrar av sínum kundum. Avleiðingin av hesum var, at fíggingarstovnar ikki kundu fíggja sølukredittirnar og tí var vandi fyri, at virkini komu at liggja inni við stórum goymslum.

Ráfiskakeyparafelagið fylgdi við hesum trupulleika og luttók í desember 2008 á einum fundi í Eksport Kredit Fonden (EKF), saman við umboðum fyri Vinnumálaráðið. Endamálið við fundinum var at kanna hvørjar møguleikar føroyskir útflytarar hava fyri at brúka tilboð hjá EKF. Niðurstøðan varð at føroyskar fyritøkur kundu brúka tænastur frá EKF á jøvnum føti við danskar fyritøkur. Av hesum er tað tó serliga endurtrygging av privatu útflutningstryggingunum, ið er viðkomandi fyri føroyskar fyritøkur. Í fyrstani var henda endurtrygging bert galdandi fyri sølu til lond, ið ikki vóru limir í ES ella OECD, men seinni er hetta víðka til at galda fyri tilsamans 150 lond, herundir øll ES-londini.

Líkt er annars til, at støðan sum heild er batnað nakað á hesum øki. Í løtuni frættir felagið einki um, at virkir hava aðrar trupulleikar við tryggingum, enn teir tey eisini høvdu havt undir vanligum umstøðum.

## Kassamiðstøðin

Føroya Ráfiskakeyparafelag eigur helmingin av partapeninginum í P/F Miðstøðini, sum rekur kassamiðstøðina á Toftum.

Í síðstu ársfrágreiðing varð greitt frá, at summir limir í felagnum vóru ónøgdir við kassa- og flutningsskipanina hjá Kassamiðstøðini (KMS) og høvdu tosað um at taka seg úr skipanini. Fyri at kanna um møguleiki var fyri at tillaga skipanina soleiðis, at áhugi framvegis var hjá øllum at halda fram, tók felagið stig til ein partaeigarafund í KMS. Á hesum fundi varð avtalað, at nevnd og stjórn í P/F Miðstøðini skuldu viðgera spurningin og venda aftur.

Niðurstøðan hjá leiðsluni í P/F Miðstøðini var í fyrstu syftu, at ongar broytingar vórðu gjørdar, tí man meinti tað vera skilabetri at bíða til framtíðarútlitini gjørdust meira støðug. Nevndin í Føroya Ráfiskakeyparafelag tók hesa støðu til eftirtektar og avgjørdi fyribils ikki at gera meira við málið. – Síðani er tó tað hent, at KMS hevur gjørt nakrar broytingar, ið m.a. merkja, at flutningsgjaldið til KMS varð tikið burtur og at keyparar og seljarar sjálvir mugu finna loysnir á flutninginum. Hóast onkur limur í keyparafelagnum hevur verið ónøgdur við hesa broyting, so tykist tað sum flestu limirnir eru nøgdir við nýggju skipanina.

Teir, ið umboða Føroya Ráfiskakeyparafelag í nevndini hjá P/F Miðstøðini eru Erlendur Johannesen, virkisleiðari hjá Faroe Seafood í Runavík og Petur H. Mohr frá Maru-Seafood.

## Elektrónisk sporførisskipan

Eitt annað felag, sum Føroya Ráfiskakeyparafelag eigur partapening í, er Føroya Sporførisskipan, sum felagið eigur saman við Føroya Ráfiskaseljarafelag.

Føroya Sporførisskipan hevur í fleiri ár arbeitt við at menna eina elektroniska farleið til sporføris- og hagtalsupplýsingar frá vinnuni til almennar stovnar, og millum ymisku liðini í virðisketuni frá fiskiskapi til keyparan á altjóða marknaðinum. Skipanin skal fevna um øll lið í virðisketuni - skip, landingarmiðstøðir, fiskamarknaðir, flutningsfeløg, framleiðsluvirkir, fiskasølur og útflutningsfeløg.

Tað hevur tó tíverri víst seg, at ganga ógvuliga strilti við at menna hesa skipan so mikið lidna, at hon kann takast í nýtslu. Royndarkoyringar eru tó gjørdar av ymiskum modulum í skipanini og hevur hetta sæð lovandi út. Á fastalávint í fjør upplýsti stjórin í Føroya Sporførisskipan, á framløgudegi, ið varð hildin á Vinnuháskúlanum, at skipanin fór at vera sett í verk í fjør. Henda vísti seg tíverri ikki at halda, og seinni í fjørð fingu partaeigararnir at vita, at neyðugt var at skjóta tkr. 500 í felagið afturat. Áðrenn hetta varð gjørt vildi keyparafelagið tó tryggja sær, at rímulig vissa var fyri, at undirtøka var fyri at brúka skipanina. Í hesum sambandi varð skipað fyri nógvum fundum, m.a. við

TAKS, FVE, flutningsfeløgini, FISK og forritarafyritøkurnar Formula.fo og Atlantstøkni. Niðurstøðan av hesum fundarvirksemi er, at sera torført er at fáa almennu myndugleikarnar, serliga FVE og FISK, at draga hesa línu saman við vinnuni. Hinvegin er eisini torført at sannføra nakran um at brúka eina skipan, sum ikki er sett í verk. Skal skipanin setast í verk í ein mun, sum ger tað gjørligt hjá fleiri fyritøkum og stovnum at knýta seg í hana, so er neyðugt at gera nakrar íløgur í m.a. hýsing av skipanini.

Tað stutta av tí langa er tó, at framtíðin hjá Føroya Sporførisskipan er ógvuliga óviss. Skal skipanin hava nakran møguleika er neyðugt við fleiri íløgum, og hóast hesar verða gjørdar, er framvegis eingin vissa fyri, at skipanin kemur at virka eftir ætlan. Neyðugt er eisini, at fyritøkur og almennir stovnar, ikki minst FVE og FISK, taka undir við hugskotinum um eina føroyska sporførisskipan og taka eina tílíka skipan til sín.

## Ólógligur, ófráboðaður og óskipaður fiskiskapur (IUU fishing)

Í síðstu ársfrágreiðing var greitt frá einari nýggjari fyriskipan um ólógligan, ófráboðaðan, og óskipaðan fiskiskap, sum ES-ráðið hevði samtykt í september 2008. (Á enskum Illegal, Unreported and Unregulated Fishing – stytt IUU-fising). Henda fyriskipan byrjaði at virka 1. januar 2010, og verður í Føroyum umsitin av Fiskiveiðieftirlitinum.

Sambært grundgevingunum fyri fyriskipanini er endamálið, at forða fyri teimum oyðileggjandi skaðum á fiskastovnar v.m., sum standast av IUU fiskiskapi. ES marknaðurin er størsti innflytari av fiskavørum í heiminum, og metir ES seg tískil hava skyldu til, at hava eina lyklastøðu í stríðnum móti IUU fiskiskapi.

Fyriskipanin er galdandi fyri øll fiskifør uttan mun til hvørjum flaggi tey sigla undir, og hvar tey fiska.

Høvuðsamboðið til tess at náa endamálinum, er ein eftirlitsskipan, ið nágreiniliga kann staðfesta hvar fiskurin er veiddur. Allur fiskur, virkaður ella óvirkaður, skal hava eitt Catch Certification Scheme (eftir hetta nevnt CCS-skjal) sum eina váttan uppá, at veiðan er farin fram eftir reglunum í fyriskipanini.

Sambært fyriskipanini skal allur fongur, um hann er veiddur í ES sjóøki, ella sjóøki hjá einum triðja landi, hava CCS-skjalið, áðrenn hann kann verða fluttur inn á ES marknaðin. CCS-skjalið skal vera vátta, av einum almennum myndugleika í tí landi har fiskifarið er skrásett. Hetta er eisini galdandi um vøra verður flutt frá triðja landi til triðja land, og síðani skal inn á ES marknaðin. Um CCS-skjalið ikki er útfylt sambært fyriskipanini, verður noktað farinum, at landa vøruna í ES havnum.

Tað er Fiskimálaráðið, ið hevur staðið fyri at fyrireika føroysku umsitingina av hesum CCS-skjali og var keyparafelagið í hesum sambandi umboðað á fleiri fundum í Fiskimálaráðnum. Sum nevnt er tað tó Fiskiveiðieftirlitið, ið umsitur hetta øki og hevur ábyrgdina av at góðkenna veiðiváttanirnar ella CCS-skjølini. Skipanin hevur nú verið í gildi í góðar 3 mánaðir, og sum skilst á flestu útflytarum, hava ikki staðist nógvir stórir trupulleikar av hesum.

## Umhvørvismerking

Spurningurin um umhvørvismerking gerst alsamt meira átrokandi, men í Føroyum er eingin felags linja á hesum øki. Sum í so mongum øðrum vinnuligum viðurskiftum, hevur verið stór ósemja, um vit eiga at ganga hesa leiðina ella ikki. Tí hendi leingi ikki tað stóra við hesum spurningi, men síðsta ári ella so er tó broyting komin í. Felagið Nótaskip hevur fingið MSC-góðkenning av sildaveiðuni og bíðar í løtuni eftir eisini at fáa makrelveiðuna góðkenda. Eisini O.C. Joensen á Oyri hevur biðið um MSC-góðkenning til skeljaveiðu og hevur fingið hesa við ávísum treytum. Somuleiðis arbeiðir Felagið Trolskip við at fáa fiskiskapin eftir upsa MSC-góðkendan, men hetta arbeiði er ikki komið so langt á leið enn. Líkt er tí til, at trýstið frá keyparum, ið spyrja eftir umhvørvismerktum (t.e. burðardygt veiddum og umsitnum) fiski, er vorðið so stórt, at mótstøðan, ið hevur verið ímóti tílíkari merking, er við at tagna. Tí kunnu vit helst rokna við, at komandi árini fer vinnan at leggja seg eftir at fáa veiðuna eftir fleiri fiskasløgum góðkenda sum burðardygga.

## Trupulleikar av, at fiskastovnar ikki eru nóg burðardygt umsitnir

Trýsti frá keyparum í sambandi við burðardygga veiðu hevur verið sera sjónligt seinastu tíðina. Serliga hava vit sæð hetta í sambandi við at bretskar handilsketur ikki vilja keypa hýsu framleidda í Føroyum. Hesa støðu hava tær tikið, tí teirra ráðgevar siga, at føroyski hýsustovnurin ikki verður umsitin burðardygt. Ráðgevingin byggir m.a. á, at føroyska hýsan er á einum lista, hjá Marine Conservation Society (MCS), yvir "Fish to avoid". At MCS setur føroysku hýsuna á henda lista, kemst m.a. av tilráðingunum hjá ICES, sum mæla frá at fiska hýsu, tí stovnurin er so lítil, at hann sjálvt undir góðum umstøðum er í vandi fyri ikki koma fyri seg aftur. Eisini heimasíðan FishSource.org gevur umsitingini av føroysku fiskastovnunum sera vánaligt skoðsmál (karakter 0,0).

Saman við øðrum hevur Ráfiskakeyparafelagið lagt stórt arbeiði í at upplýsa bretskar innkeyparar og onnur um okkara veiðu og umsiting, og hava í hesum sambandi bæði verið fundir í Føroyum og uttanlands. Fundir hava t.d. verið við Youngs og Coldwater, ið

eru týðandi kundar hjá føroyskum framleiðarum. Fundur hevur eisini verið við felagsskapin Seafish, ið er sæddur sum ein leiðandi ráðgevandi stovnur fyri fiskivinnuna í Stóra Bretlandi, hóast stovnurin ikki beinleiðis hevur nakað vald. Seafish sendur javnan kunningar- og ráðgevandi skriv út, sum serliga verður brúkt av innkeyparunum hjá teimum stóru feløgunum. Viðmælini hjá Seafish eru ikki altíð tey somu sum tey hjá øðrum felagsskapum, sum t.d. MSC og ICES, og Seafish hevur tað fatan, at føroyska fiskaveiðan er eins burðardygg sum hjá øðrum. Kanska enntá meir burðardygg enn hjá øðrum, av tí at einki verður kasta útaftur.

Tað vísir seg heldur ikki at vera so nógv sjálv fiskiveiðan sum er ein trupulleiki, men meira umsitingin av fiskastovnunum. Tí er eftir øllum at døma eisini neyðugt, at nakrar umsitingarligar/politiskar avgerðir verða tiknar, áðrenn føroyskar fiskavørur aftur fáa betri atgongd til bretskar kølidiskar. Í tíðindaskrivi, sum Seafish sendi út aftaná at tey høvdu havt fund við umboð fyri føroyska fiskivinnu, varð hetta orðað soleiðis: *"There are issues that need to be addressed if the supply chain is to be re-established, particularly concerns over the discrepancy between government and scientific advice on numbers of fishing days."* Trupulleikin, ið her verður sipað til, er, at Løgtingið ásetur nógv fleiri fiskidagar enn ráðgevingin frá Havstovuni mælir til. Í summum førum, serliga í bólki 5, eru nøgdin av tillutaðum døgum eisini so stór, at hon langt frá verður brúkt, og tí er í veruleikanum talan um óavmarkað dagatal!

## The Faroe Islands Seafood Conference

28. mai 2009 var Uttanríkisráðið vertur fyri ráðstevnuni The Faroe Islands Seafood Conference, sum var løgd til rættis í samstarvi millum táverandi SamVit, Føroya Ráfiskakeyparafelag, Fiskimálaráðið og Føroya Ráfiskaseljarafelag. Ráðstevnan viðgjørdi m.a. marknaðarstøðuna sum heild og hvørja ávirkan búskaparkreppan fór at hava á marknaðirnar og harvið eisini útlitini hjá føroyskum feløgum. Aðrir spurningar, ið vórðu viðgjørdir vóru í hvønn mun føroyski fiskaídnaðurin verður burðardygt umsitin og týdningurin av at kunna spora fiskin aftur til burðardyggar framleiðsluhættir. Millum fyrilestrahaldararnar vóru Klaus Nielsen frá Espersen A/S, ið helt fyrilestur við heitinum "How Espersen has changed from producing fillets based on local resources to a large market oriented company with global sources"; Jonathan Banks frá Nielsen, ið tosaði um "Seafood and the European Consumer" ; Anthony Hilton frá Evening Standard, ið setti spurningin "The global Economic crisis - can the world afford to eat?" og Hjalti í Jákupsstovu frá Havstovuni hevði framløgu við heitinum "Hvussu langt eru vit frá tí burðardyggu fiskiveiðuni."

Endamálið við ráðstevnuni var at seta og svara spurningum, sum høvdu serligan áhuga fyri føroyska fiskaídnaðin. Ynski var at geva ráðstevnuluttakarunum eitt fjølbroytt yvirlit yvir marknaðirnar, herundir upplýsingar um tørv og krøv hjá kundunum, og hvussu føroyski ídnaðurin kann ganga á hesum á møti. – Ráðstevnan eydnaðist væl og fekk góða umrøðu og góð ummæli í fjølmiðlunum.

## Samstarvsfundir við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna

Seinasta ári ella so, hevur verið skipa fyri 2-3 fundum millum limir í Føroya Ráfiska-keyparafelag og umboð fyri HFS. Endamálið hevur verið at taka mál upp, ið eru av felags áhuga fyri virkini, og fáa hesi umrødd við tí í hyggju, at finna skilagóðar og brúkiligar loysnir fyri virkini. Millum fundirnar hevur eisini onkur arbeiðsbólkur sitið og evnað uppskot til loysnir. Fundirnir hava riggað væl, men tað hava tó ikki verið so nógv mál uppi og vent. Kanska merkir hetta, at virkini ikki hava so nógv felagsmál, ið tey ynskja at taka upp við HFS? Men hinvegin er hesin leistur nú royndur, og kann tátturin tí altíð takast upp aftur, tá tørvur er á tí.

## Nýggj matvørulóg

Uppskot til nýggja matvørulóg er lagt fram í Løgtinginum og liggur nú í Vinnunevndini. Felagið hevur áður latið Vinnumálaráðnum hoyringsskriv í hesum sambandi og hevur eisini havt høvi at møta í Vinnunevndini.

## Broytingar í kunngerð um avreiðingar í Føroyum og uttanlands

Í løtuni arbeiðir fiskimálaráðharrin við at broyta kunngerðina fyri avreiðing í Føroyum og uttanlands. Tað sum í hesum sambandi kanska er mest viðkomandi fyri okkara limir, er at ætlanin er at avtaka uppboðssølukravið til hýsu í eini royndartíð fram til 1. September 2010.

## Skjal 1: Fiskavøruútflutningur í 2008 og 2009

Útflutningsvirði er gjørt upp í FOB.
Kelda: Hagstova Føroya, dagført 16. februar 2010

| | Virði í 1.000 DKK | | | Nøgd í tonsum | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2008** | **2009** | **Munur** | **2008** | **2009** | **Munur** |
| Annar fiskur, i.a.n. | 252.997 | 194.794 | -58.203 | 34.127 | 16.894 | -17.234 |
| Annar ídnaðarfiskur, i.a.n. | 6.365 | 5.913 | -452 | 966 | 1.123 | 157 |
| Blálonga | 10.841 | 12.231 | 1.389 | 805 | 943 | 138 |
| **Brosma** | **39.276** | **38.372** | **-904** | **1.604** | **1.913** | **309** |
| Búrfiskur | 1.525 | 0 | -1.525 | 85 | 0 | -85 |
| **Gullaksur** | **80.144** | **74.760** | **-5.384** | **7.146** | **5.992** | **-1.155** |
| Havtaska | 59.602 | 56.850 | -2.753 | 1.315 | 1.144 | -171 |
| Hávur | 1.397 | 1.774 | 377 | 119 | 146 | 27 |
| Hummari | 8.305 | 5.525 | -2.780 | 54 | 51 | -3 |
| Hvítingur | 10.109 | 7.374 | -2.735 | 690 | 423 | -267 |
| **Hýsa** | **171.327** | **99.054** | **-72.273** | **7.537** | **5.883** | **-1.654** |
| Jákupsskel | 9.782 | 14.285 | 4.502 | 239 | 440 | 201 |
| Kalvi | 8.740 | 8.002 | -739 | 190 | 179 | -11 |
| Kikarafiskur | 451 | 0 | -451 | 64 | 0 | -64 |
| Kongafiskur | 52.280 | 44.485 | -7.795 | 3.695 | 3.150 | -545 |
| Krabbi | 9.614 | 3.555 | -6.059 | 131 | 127 | -4 |
| Laksur | 816.902 | 1.202.648 | 385.746 | 30.866 | 40.560 | 9.694 |
| Langasporl | 6.232 | 3.523 | -2.709 | 639 | 353 | -286 |
| Livur | 6.828 | 3.849 | -2.979 | 276 | 135 | -141 |
| Lodna | 11.688 | 0 | -11.688 | 6.359 | 0 | -6.359 |
| **Longa** | **86.323** | **76.266** | **-10.057** | **2.945** | **3.271** | **326** |
| Lýsi | 379 | 3.618 | 3.239 | 55 | 67 | 12 |
| Lýsingur | 928 | 7.537 | 6.609 | 291 | 4.709 | 4.418 |
| Makrelur | 174.749 | 174.010 | -739 | 28.372 | 30.636 | 2.263 |
| Nebbasild | 376 | 127 | -249 | 58 | 9 | -50 |
| Onnur skeljadjór o.l. i.a.n. | 758 | 498 | -260 | 2.386 | 1.632 | -754 |
| Reyðsprøka | 19.174 | 16.540 | -2.634 | 601 | 697 | 96 |
| Rogn | 7.201 | 8.422 | 1.221 | 327 | 377 | 50 |
| Rækjur | 116.609 | 102.712 | -13.898 | 9.010 | 7.627 | -1.383 |
| Síl | 137.733 | 175.082 | 37.348 | 6.208 | 7.171 | 963 |
| Sild | 146.437 | 177.094 | 30.657 | 49.736 | 53.562 | 3.826 |
| Skrubba | 166 | 801 | 635 | 36 | 81 | 45 |
| Skøta | 1.503 | 1.745 | 243 | 162 | 163 | 1 |
| Slógv | 33.440 | 23.721 | -9.720 | 29.748 | 27.170 | -2.578 |
| Steinbítur | 4.540 | 3.533 | -1.007 | 124 | 210 | 86 |
| Stinglaksur | 17.968 | 18.363 | 395 | 1.109 | 995 | -115 |
| Svartkalvi | 67.798 | 51.597 | -16.201 | 3.445 | 2.640 | -805 |
| Svartkjaftur | 52.410 | 30.582 | -21.829 | 56.811 | 17.168 | -39.643 |
| **Toskur** | **604.829** | **402.185** | **-202.644** | **13.344** | **12.881** | **-462** |
| Tunga | 8.107 | 4.995 | -3.112 | 357 | 282 | -75 |
| **Upsi** | **494.242** | **573.713** | **79.471** | **27.972** | **32.688** | **4.716** |
| **Tilsamans** | **3.540.461** | **3.630.249** | **89.788** | **330.086** | **283.519** | **-46.568** |